SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Eg havi bíðað við avgerðini, men nú má eg umhugsa, um eg skal halda fram í AB*

*Rúni Nolsøe, spælandi venjari hjá nýggja Formulaliðnum*

# Nýggjar tíðir fyri judo í Føroyum

**Leygardagin var stór móttøka í Miðlahúsinum, tá Judosamband Føroya fylti 25 ár. Judo hevur ikki verið partur av Oyggjaleikunum síðani 1995, og tí hevur hesin ítróttur verið í minking. Nú standa tó nýggjar avbjóðingar fyri framman, tí judo verður aftur við á Oyggjaleikunum á Rhodos komandi summar**



JUDO
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fitt av fólki var savnað í Miðlahúsinum leygardagin til stóra móttøku, tá Judosamband Føroya hátíðarhelt 25 ára stovningardagin. Judosambandið vísti fram gamlar myndir heilt afturi frá 1970'unum. Teir vístu eisini myndir frá góðu úrslitunum á Oyggjaleikunum á Álandi í 1991 og av leikunum á Gibraltar í 1995.

Judo kom annars til Føroya í 1971, tá judofelag bleiv sett á stovn innan felagið Bragdið. Tað vóru teir báðir ungu danirnir Sven Nørspang og Niels Sørensen, sum løgdu lunnar undir judoíttróttina í Føroyum. Eftir at judofelag var sett á stovn í Havnini, so gekk ikki long tíð, áðrenn klasvíkingar eisini fingu sítt judofelag. Tvey ár eftir stovnsetingina av Havnar Judofelag, bleiv Klaksvíkar Judofelag sett á stovn.

Tað gingu heili átta ár, áðrenn næsta judofelagið í landinum bleiv sett á stovn. Tá fóru tvey onnur judofeløg í gongd við sítt virksemi, nevniliga Sunda Judofelag og Vága Judefelag. Í hesum sambandi blivu fundarboð send út til hesi fýra feløg, tí tá trý ella fleiri feløg eru í Føroyum innan eina ítróttargrein, so ber til at stovna eitt sersamband undir Ítróttasambandi Føroya. Á fundinum verður avgjørt ímillum tey fýra feløgini at stovnað Judosamband Føroya, og í august mánaði sama ár varð fyrsti aðalfundur á skránni hjá Judofelag Føroya.

### Lógu framvið til Oyggjaleikirnar

Fýra ár eftir, at Judosamband Føroya varð sett á stovn, byrjaðu Oyggjaleikirnir, og formaðurin í Judosamband Føroya, gjáarmaðurin Sofus D. Johannesen sigur, at føroyingar royndu, saman við øðrum judofeløgum at fáa judo við á fyrstu leikirnar.

– Vit lógu framvið at fáa judo við í 1985 á Isle of Man og í 1987 á Guernsey. Hetta eydnaðist okkum tó ikki, men í 1989 her í Føroyum riggaði. Vit fingu judo við til Oyggjaleikirnar, og hetta var byrjanin til eitt gott tíðarskeið fyri judoíttróttina í Føroyum.

Judo var við á Oyggjaleikunum heilt frá 1989 og fram til 1995 á Gibraltar. Føroyingar fingu fleiri góð úrslit. Á Oyggjaleikunum í Føroyum fingu føroyingar eina góða byrjan uppá judotilveruna á leikunum. Vit fingu fýra gullmedaljur, eina silvur og tvær bronsumedaljur. Á Álandi í 1991 gekst heldur verri, og har fingu vit bert eina gullmedalju, fýra silvur og tvær bronsu. So vendi gongdin aftur, og á Isle of Wight bleiv úrslitið tríggjar gull, tríggjar silvur og tvær bronsu medaljur. Á hesum leikum fingu Føroyar m.a. bæði silvur og bronsu í liðkappingini, og hetta var eitt sera flott úrslit.

Enn betri gjørdist úrslitið á Gibraltar tvey ár seinni. Hesaferð fingu føroyingar tríggjar gull, tríggjar silvur og seks bronsu medaljur, og her fingu vit gull í liðkappingini á fyrsta sinni. Hetta var besta árið hjá judarunum í Oyggjaleikahøpi, men hetta gjørdist eisini endin á hesum sinni.

### Judo byrjaði at detta niðurfyri

Næstu Oyggjaleikir var judo ikki partur av leikunum, og hetta gjørdist byrjanin til eina ringa gongd innan judo í Føroyum. Í tíðarskeiðnum eftir stovnanina av Judosamband Føroya duttu fleiri av smærru feløgunum niður fyri. Vága Judofelag, Vágs Judofelag og Kollafjarðar Judofelag vóru ikki longur lívið lagað, og eftir at judo hálvavegna misti oyggjaleikastatus í fleiri ár, so mátti Klaksvíkar Judofelag ásanna, at hetta fór ikki at ganga. Fyri nøkrum árum síðani máttu teir eisini gevast við sínum virksemi. Eftir eru nú bert tvey judofeløg, nevniliga Havnar Judofelag og Sunda Judofelag.

Tað sást eisini aftur ímillum judoíðkararnar, at judo ikki var partur av Oyggjaleikunum í fleiri ár. Áhugin minkaði, og fleiri av royndu kreftunum innan judo valdu at gevast ella at fara til annan ítrótt. Denturin bleiv so lagdur á eitt gott ungdómsarbeiði, og Sofus Johannesen heldur, at áhugin fyri judo er stórur millum børn og ung.

– Tað var eitt tíðarskeið, har tað ikki sá so væl út hjá judo í Føroyum. Fleiri feløg duttu niður fyri, samstundis sum vit ikki hava luttikið á Oyggjaleikunum í fleiri ár. Sjálvt um fleiri av royndu kreftunum innan føroyska judo eru givnar, so hevur áhugin altíð verið stórur millum børn og ung, og tí hava vit valt at leggja stóran dent á ungdómsarbeiðið.

### Judo aftur á oyggjaleikaskránna

Nú hevur judo verið í einum aldudali í fleiri ár, men ljós er fyri endan á tunlinum. Judo verður aftur ein partur av Oyggjaleikunum á Rhodos næsta summar, og hetta eru gleðiboð fyri Judosamband Føroya, staðfestir Sofus.

– Næsta summar eru 12 ár liðin, síðani judo seinast var partur av Oyggjaleikunum, so tað vóru eini gleðiboð fyri Judosambandið, tá vit fingu at vita, at judo aftur bleiv partur av Oyggjaleikunum á Rhodos. Judo verður eisini partur av leikunum á Álandi í 2009, og vónandi eisini á Isle of Wight í 2011. So nú ber veruliga til at seta nøkur framtíðar mál til judoíðkarar, og hetta fer vónandi at økja um áhugan ímillum føroyingar aftur.